ítróttur

Nr. 83 • hósdagur • 3. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

HB-B36 0-3 (0-2)

# HB vann sannførandi

**HB hevur spælt seg víðari í hálvfinaluna, eftir at liðið vann sannførandi 3-0 á greipuvinnarunum úr B36, sum ikki vísti nakað meistaraspæl. Uni Arge fekk tvey mál og Rúni Nolsøe skoraði eitt**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*Áki Mørk í hvítum og Andrew av Fløtum kappast um bóltin. Andrew og hinir í HB mundu fegnast um sigurin, eftir at B36 tríggjar ferðir vann á HB í fjør*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

HB er ein av heilt stóru favorittunum at vinna meistaraheitið í ár. Tað staðfestu teir svørtu og hvítu í Gundadali mikukvøldið, tá B36 varð sent av vøllinum við einum 3-0 tapi. HB er enn ósigrað í teimum sjey dystunum steypakappingini.

B36 er hinvegin komið í ein aldudal, og hetta var triðja tapið á rað í steypakappingini.

Eingin ivi var um, at HB var betra liðið, og úrslitið talar fyri seg. Tað sást beinanvegin, at HB var vandamiklari frameftir vøllinum. Uni Arge var tann fremsti áleyparin, og hann fekk góðan stuðul frá Andrew av Fløtum og Jón Róa Jacobsen í borðunum. Tað vóru eisini hesir báðir, sum løgdu upp til málini hjá Una.

HB fekk tann fyrsta málmøguleikarn longu eftir fýra minuttir. Rangstøðufellan hjá B36 miseydnaðist, og Jón Rói varð sendur avstað í høgru síðu. Hann var leystur við málverjanum, men tað var heldur spískt, og René Tórgarð bjargaði.

Fyrsta málið kom eftir 18 minuttir, og tað var samstarv millum Andrew av Fløtum og Una Arge. Andrew fór ígjøgnum í vinstru síðu, dróg inn í brotsteigin og legði inn til Una Arge, sum langaði til við vinstra beini uttan møguleika hjá René at bjarga. Tú hevði longu tá eina kenslu av, at HB fór at vinna dystin.

B36 royndi at svara aftur, og Jákup á Borg hevði ein góðan møguleika stutt eftir fyrsta málið, men skotið fór framvið.

Din Sandu var eisini nær við at javna, tá hann setti høvdið á bóltin eftir hornaspark. Rúni Nolsøe var tó á strikuni og beindi bóltin burtur. So B36 var tó ikki heilt fyri ongum fyri steðgin.

B36 vildi eisini hava brotsspark, tá John Petersen royndi at leggja innfyri. Bólturin rakti hondina hjá Jan Dam, men dómarin dømdi horna ístaðin. Annars kann sigast, at Niklas á Líðarenda kanska lat í so nógv um seg ganga fyri steðgin.

Tað var tó HB, sum økti um leiðsluna. Tíðin var farin, men Niklas legði nakrar minuttir afturat, og tað kom HB til góðar.

Aftasti maðurin hjá B36 liggur nakað djúpt, og tí var Jón Rói Jacobsen ikki rangstaddur, tá Hallur Danielsen sendi hann avstað í vinstru. Uni Arge, sum stendur leysur í brotsteiginum, fær bóltin og langar til fyrstu ferð. 2-0 til HB.

### HB økir

Hetta málið kom rættiliga illa við hjá B36, tí beint aftaná blásti dómarin fyrra hálvleik av. HB hevði sera góð kort á hondini nú.

Bara fýra minuttir inn í seinna hálvleik økti liðformaðurin Rúni Nolsøe um leiðsluna. Hann kom at standa púra leysur í brotsteiginum eitt sindur høgrumegin málið. Hann ivast ikki, men langar til framvið einum hjálparleysum René.

B36 hevði stórar trupulleikar í verjuni, og HB-ararnir dugdu væl at gera sær dælt av hesum. Minuttin seinni var aftur boð eftir B36-verjuni. Uni Arge skallar, men René bjargar meistarliga.

Tað kann sigast um HB sum heild, at teir tóktust grammari og ídnari um allan vøllin. Teir vóru raskari at jagstra bóltarnar, og hetta tók B36 á bóli.

Hóast HB var trý mál frammanfyri fall B36 als ikki í fátt, men royndi at leggja trýst á. Hetta eydnaðist eisini, tí HB tók seg samstundis eitt sindur aftur á vøllin at verja leiðsluna.

B36 fekk tá fleiri møguleikar at minka um munin, men hepni var ikki við teimum henda dagin.

### Misnýtt brotsspark

John Petersen var sekur í at misnýta fyrsta møguleikan. Jákup á Borg leggur innfyri úr høgra borði, og John Petersen kom at standa púra leysur frammanfyri málinum. Hann skuldi bara seta høvdið á bóltin, men hann brast í stongina. Tá var hálvur tími eftir, og eitt mál tá hevði avgjørt givið B36 vónina aftur.

Tað var tó óskiljandi, at venjarin hjá B36 ikki framdi broytingar á liðnum, sum kundu givið álopsspælinum meira flog, tí HB verjan hevði fyri tað mesta tamarhald á støðuni. Tá hann skifti út, vóru tað útskiftingar, sum ikki høvdu nakrar broytingar við sær.

Tá einir tjúgu minuttir vóru eftir, fær B36 brotsspark. Karl Leonsson spælir til Bárð Mortansson, sum vendir sær hegnisliga og dregur móti baklinjuni. Tá hann leggur innfyri rakar bólturin hondina hjá Jan Dam. Hesuferð peikar Niklas á blettin. Bárður Mortansson hevði annars ikki nakran góðan dag móti gomlu liðfeløgunum.

Jens Kristian Hansen verður settur at taka brotssparkið, men Bárður Johannesen í málinum lesur skotið av og bjargar. Eftir hetta fall B36 heilt í fátt, og HB-arar kundu kenna seg tryggar í sigrinum.

Bárður Johannesen hevði ein góðan dag í málinum. Hann var tryggur í luftspælinum og hevði nakrar góðar bjargingar. Eisini Jan Dam spældi væl, og áleypararnir hjá B36 fingu ongantíð frið.

HB man nú vera favorittur at vinna steypakappingina. Teir spældu góðan álopsfótbólt vóru kaldir frammanfyri málinum í avgerandi løtunum.

<u>Dysturin í tølum:</u>
HB-B36 3-0 (2-0)
1-0: Uni Arge
2-0: Uni Arge
3-0: Rúni Nolsøe

<u>HB:</u> Bárður Johannesen – Jan Dam, Jóhannus Joensen, Hans á Lag – Tór-Ingar Akselsen, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Hallur Danielsen (Nicu Dogaru) – Andrew av Fløtum (Vagnur Mortensen), Uni Arge, Jón Rói Jacobsen

<u>B36:</u> René Tórgarð - Egil Zachariasen, Áki Mørk (Karl Leonsson), Jens Kristian Hansen, Arnbjørn Danielsen – Jákup á Borg, Kenneth Jacobsen (Niels Joensen), Din Sandu, Magni á Lakjuni, John Petersen, Bárður Mortansson (Heini í Skorini)




*Rógvi Jacobsen fer framvið Kenneth Jacobsen. HB hevur sett kós móti hálvfinaluni, og væntandi møta teir VB, um vágbingar basa EB/Streymi í Vági*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Spennandi verður, um Todi og FCK fara at vinna »The Double« í ár*
*Mynd: Polfoto/Lars Poulsen*

# Todi sendi FCK á meistarakós

**Eftir at hann hevur skorað trý mál í fýra dagar stendur Todi Jónsson frammanfyri størstu avbjóðingunum nakrantíð**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Christian Høgni Jacobsen var allar 90 minuttirnar á Vejle beinkinum í Parkini mikukvøldið. Møguleikarnir hjá honum at sleppa upp í part minkaðu, tá Vejle stutt eftir stegðin misti ein mann. Tá varð venjarin noyddur at taka annan av álopsspælarunum út fyri at styrkja um miðvøllin.

Men Christian Høgni fekk ivaleyst eitt sindur burturúr. Hann sá í hvussu so er landsmannin Toda Jónsson, sum Christian Høgni hevur arvað landsliðssessin eftir, skorað sigursmálið, tá FCK frammanfyri 17.269 áskoðarum við neyð og deyð bjargaði sær øll trý stigini.

Sum vera man var Todi Jónsson ógvuliga fegin. Tað vóru seytjan minuttir eftir, og avrikið hjá FCK hevði ikki verið meiri enn passaligt: Føroyski álopsspælarin tóktist heilt senuvandur, tá hann smoygdi hvítu troyggjuna upp um høvd og veittraði við henni til áskoðarararnar, sum nú hava alla orsøk til at rokna við, at FCK fer at endurvinna gullkrónurnar:

– Tað er ein øgiligur lætti at skora mál. Tá tú ert álopsspælari hjá FCK, so veitst tú, at tað verður roknað við, at tú skorar mál. Trýstið er stórt alla tíðina, og tí kennist lættin uppaftur størri, sigur ein ovurfegin Todi Jónsson, sum kortini heldur bæði beinini á jørðini. Hann gleðist um hvørja ferð tað eydnast honum at spæla, uttan at hann verður skaddur, og gleðin er sjálvandi uppaftur størri, tá tað gongst, sum tað hevur gjørt tær seinastu vikurnar.

Mikukvøldið í síðstu viku var hann við til at spæla FCK í steypafinaluna. Sunnudagin skoraði hann tvey mál, tá FCK vann 3–1 í Esbjerg, og so skoraði hann sigursmálið mikukvøldið:

– Christian Lønstrup stakk bóltin fram ímillum. Eg var ikki rangstaddur, slapp framum aftasta mannin hjá teimum, rak ímóti málverjanum og var heppin at seta bóltin framvið honum, sigur Todi Jónsson, sum við málinum vísti, at sjálvsálitið er í toppi. Hann kundi havt spælt Zuma, sum fylgdi við í vinstru, men sovorðið ger ein álopsspælari við stórum sjálvsáliti ikki í einari sovornari støðu.

2–1 málið skoraði Todi, tá tað restaðu seytjan minuttir. Sjey minuttir seinni valdi FCK venjarin Hans Backe at taka føroyska álopsmannin av vøllinum. Peter Møller kom inn ístaðin fyri. Todi hevur fyrr í vár sagt venjaranum, at honum hevði dámt best ikki at spælt alla tíðina, nú tað eru dystir á skránni bæði sunnudag og mitt í viku. Og rímuligt hugsaði venjarin um næstu dystirnar, tá hann valdi at skifta Toda út.

### DM og steypasigur

Fyri framman standa tvær tær mest spennandi vikurnar í langa fótbóltslívinum hjá Toda Jónsson. Sunnudagin skulu hann og FCK í gamla heimstaðin hjá Toda, Århus, har tað ikki verður lætt ímóti hart kroysta heimaliðnum. Hósdagin í komandi viku, Kristi himmalsferðardag, skulu teir í Parkini spæla steypafinalu ímóti OB, og annan sunnudag verður stórdysturin ímóti Brøndby í Parkini. Í donsku fjølmiðlunum staðfestu teir í gjár, at talan verður um eina sanna finalu.

Síðsta umfarið í superliguni verður hósdagin 16. mai. Tann uppgávan verður eisini stór hjá FCK, sum endar kappingarárið í Ålborg.

Avbjóðingin hjá FCK er sera stór, og hjá Toda Jónsson er tað munur á nú, og so tá FCK vann DM fyri einum lítilum ári síðani. Tá var hann skaddur í lærinum og hugdi at. Nú er hann millum lyklaspælararnar, og venjingarstøðan og sinniliga yvirskotið økjast alla tíðina. Men hann tekur ein dag í senn:

– Tað hevði verið gott, um gamli dreymurin um at spæla fótbólt aðra staðni í Europa enn í Danmark kundi gjørst veruleiki. Men eg eri 30 ára gamal, og tað skal góð heilsa, hepni og støðug málskjóting til.

Sáttmálaskeiðið hjá Toda og FCK er liðugt komandi summar:

– Eg rokni við, at vit í summar fara at tosa saman um framtíðina, sigur Todi Jónsson, sum í gjár fór undir fyrireikingarnar til dystin í Århus. DM og steypafinala standa fyri framman, men Todi tekur bara ein dag í senn.